gult cyan magenta svart

# ítróttur

Nr. 34 • leygardagur • 17. februar 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# B36 hevur fingið eitt kall

**Enn er tað tó ikki komið so langt, at talan er um seinasta útkall ella neyðarkall. Tað snýr seg um nýggja høvuðs-sponsor felagsins, sum ber heitið, Kall**

SPONSORSÁTTMÁLI
*Jákup Mørk*

Á stórslignum tíðindafundi beint fyri døgurða fríggjadagin, varð seinasta skotið á fjarskiftisøkinum avdúkað. Tað hevur leingi verið greitt, at Alnót hevði í hyggju at gerast ein partur av føroyska telemarknaðinum, men sum nevnt í blaðnum ígjár, so skuldi hetta ikki vera undir navninum, Alnót, tí hetta ikki longur var dekkandi fyri virksemi felagsins. Nýggja navnið á felagnum verður ístaðin »Kall«.

Umframt, at sjálvt navnið alment varð tikið í nýtslu í gjár, so varð fyrsti liður í lýsingarherferðini eisini avdúkaður. Komandi tvey árini skal annað av stóru høvuðsstaðarfeløgunum, B36, bera »Kall« á bringuni, og á tann hátt gera sítt til, at navnið verður kent millum føroyingar.

## Vilja hava ferð á

Um orsøkina til, at tað júst varð B36, sum Kall valdi at gera sponsorsáttmála við, sigur Bjarni A. Bjarnason, stjóri, at orsøkirnar til hetta eru fleiri.

– Vit høvdu framman undan gjørt okkuim greitt, at ítróttur í hvussu so er skuldi vera ein av teimum miðlum, sum vit skuldu nýta. Tað er nakað, sum eftir okkara tykki er í samljóði við tað, sum vit fegnir vilja útstrála. Nakað við ferð, spenningi og frískleika, og hetta er nakað, sum vit hava roynt at gjørt so gjøgnumført sum gjørligt.

– Tú kanst eitt nú taka búmerki okkara, sum jú er orange litt. Hetta er nakað, sum útstrálar frískleika, stuttleika, fær teg at hugsa um C-vitaminir o.s.fr.

– Alt hetta høvdu vit gjørt okkum greitt, og tá so B36 setti seg í samband við okkum, fóru vit hugsa, um hetta ikki var ein háttur at røkka hesum. Vit hava so tugt eitt sindur upp á hetta, og niðurstøða okkara er, at vit á hendan hátt hava ein góðan møguleika at koma í kontakt við ein stóran part av okkara málbólki, sigur Bjarni Bjarnason at enda.

## Tíðin var búgvin

Avtalan við B36 er galdandi í tvey ár, og Kristian á Neystabø, formaður í B36, dylur ikki fyri, at hann heldur talan vera um eina góða avtalu.

Akkurát hvussu nógv avtalan snýr seg um í pengum, vil Kristian ikki siga, men hann leggur dent á, at hann heldur hetta vera eina góða avtalu fyri felagið.

Spurdur, um talan er um sonevndan bonussáttmála, har ymsar peningaupphæddir eru galdandi, alt eftir hvussu liðið stendur seg í kappingini, svarar Kristian, at tað er tað ikki í útgangsstøði. So er spurningurin helst, um Kall hevur somikið stórt álit á felagnum, at teir rokna við, at teir koma at liggja í oddinum, har størsta fokuseringin upp á fótbóltin vanliga liggur.

B36 hevur annars í drúgt áramál havt oljufelagið, Shell, sum høvuðsstuðul, men spurdur um, hví teir skifta, sigur Kristian, at hetta einki hevur við nakra ónøgd at gera.

– Tað ræður eisini um, at felagið ikki verður ov fast samantengt at einari ávísari fyritøku. Tá kann samantengingin gerast so inngrógvin, at tað nærum ikki ber til at skifta.

– Vit hava verið væl nøgdir øl hesi árini, men vit hildu nú, at tíðin var búgvin at skifta, og tað hava vit so gjørt, sigur Kristian.



*Fimm leikarar hjá B36 vórðu kallaði til at vísa nýggju búnarnar. Frá vinstru eru tá Sólvá Joensen, Tróndur Vatnhamar, Jákup á Borg, Ása á Neystabø og Ingi Højsted*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Av stað í dag



*Í dag fer Ingi Højsted fyri aðru ferð til Onglands, har hann aftur hesa ferð skal venja við Arsenal*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**15 ára gamli Ingi Højsted fer í dag til Onglands, har hann skal venja við stórfelagnum, Arsenal**

Sum vit áður hava nevnt, so skal Ingi Højsted aftur nú til Onglands, har hann fyrr hevur verið og vant við stórfelagnu, Arsenal, sum hevur væl lýdda venjaran, Arsene Wenger við stýrisvølin.

Umframt at venja við felagnum, skal Ingi eisini á ferðini spæla nakrar dystir við ungdómsliðnum hjá Arsenal, og millum annað er ein dystur móti Norðurírska U-17 landsliðnum á skránni á ferðini.

Ingi er bert ein av fleiri leikarum, sum umboðsmaðurin, Jákup í Stórustovu, seinastu árini hevur fingið til venjingar hjá útlendskum feløgunum, og einki er, sum bendir á, at áhugin fyri ungu føroyingunum er minkaður.

Í longri tíð hevur Jákup við stuðuli frá fleiri føroyskum fyritøkum arbeitt við hesum máli, og at áhugin er vaksandi, sigur hann seg ikki ivast í. Fyritøkurnar, sum eru við í verkætlanini at stuðla ungu leikarunum eru Føroya Sparikassi, Tryggingarfelagið Føroyar, Atlantic Airways, P/F Ísbjørnin og Thoma Dam Ítróttur.

## Troyggjur til sølu

Tá talan fellur inn á útlendsk feløg, er seinnu árini vorðið alt meira vanligt, at viðhaldsfólkini hjá hesum keypa sær leikbúnarnar hjá favorittliðnum, og kanska serliga børnini hava so kunna liva seg inn í leiklutin hjá fótbóltshetjum sínum.

Nú er líkt til, at B36 eisini ætlar sær við til hett, tí sambært formanninum opnar avtalan fyri møguleikanum, at Kall kann selja leikbúnar, sum eru líkir teimum hjá B36.

– Enn er so ikki gjørt meira við hetta, men nú er møguleikin har, og tað kann væl verða, at hetta fer at síggjast innan ikki alt ov langa tíð, sigur ein væl nøgdur Kristian á Neystabø at enda.

gult cyan magenta svart



# Dráttur–Mjølnir

FINALUDYSTUR
*Jákup Mørk*

Fyri einum ári síðani var liðskiparin hjá Drátti, Helga Nordendal, við til at tapa steypafinaluna móti Mjølni, og sjálvsagt er hetta ikki nakað, sum hon ætlar sær at royna aftur í dag. Størsti spurningurin man tó vera, hvat Dráttur skal gera fyri at forða eini endurtøku, og her hevur Helga fleiri orsøkir til, at tað í ár skulu verða tær.

– Fyrst og fremst hava vit ikki sama liðið í ár, sum vit høvdu í fjør. Vit hava fingið útlendskan venjara, og tað er púra greitt, at Marina hevur styrkt nógv um álopspartin. Har afturat eru vit eisini sterkari í verjuni, enn vit vóru í fjør, har vit tvær ferðir missa eina greiða leiðslu, tá vit verða pressaðar í servuni.

## Fleiri royndir

Spurd, um hetta at tær í fjør mistu greiðar leiðslur, ikki eisini komst av væntandi royndum, svarar hon, at tað gjørdi tað sjálvandi eisini.

– Vit hava ofta havt rættiliga stóra útskifting á liðnum, har Mjølnir kvinnurnar allar hava spælt saman í nógv longri áramál. Tær kenna hvørja aðra betri, og hava eisini nógv fleiri royndir, men eisini her eru vit betri fyri í ár. Vit hava jú allar tær, sum vóru við í fjør, umframt Marinu.

– Eisini haldi eg, at tað hevur nógv at siga hjá okkum, at vit í ár hava vunnið tríggjar ferðir á Mjølni. Tað høvdu vit ikki roynt undan finaluni í fjør, og tí vil eg siga, at vit í nógv størri mun trúgva upp á gullið í ár, sigur Helga.

Ikki minst man seinasti sigurin á Mjølni fyri viku síðani hava styrkt um sjálvsálitið hjá vágagentunum, og hesum gevur Helga okkum eisini rætt í.

– Vit vístu veruliga í tí dystinum, at vit vildu vinna. Tvær av teimum føstu vóru burtur frá, men kortini megnaðu vit at stríða okkum til sigurs, so tað styrkir avgjørt um vónirnar. Ikki minst at vit megnaðu at vinna fjórða sett, eftir at vit høvdu tveitt eina tryggja leiðslu burtur í triðja, ger, at vit av álvara trúgva upp á tað.

Tær av leikarunum, sum ikki vóru við seinast, eru nú aftur tøkar, og Helga roknar eisini við, at allar vera við í Høllini á Hálsi í dag. Eisini hóast onkrir smáskaðar eru, og áðrenn vit takka



fyri samrøðuna, gevur hon enn eina orsøk til, at Dráttur skal vinna dystin i dag.

– Nú hava tær vunnið so ofta, so eg haldi so avgjørt, at tað nú er okkara túrur, sigur ein spent Helga Nordendal at enda.

∆

FINALUDYSTUR
**Jákup Mørk**

Ein skuldi ikki hildið, at ein steypafinala var nakað, sum kann økja um spenningin í flogbóltstilveruni hjá Marjuni Kalsø. Sum leikari hevur hon verið ígjøgnum alt tað, sum føroyskur flogbóltur hevur at bjóða. Metkvinnan á landsliðnum hevur vunnið bæði FM-, steypa- og Oylkapping, men kortini var tað ein sera spent Marjun, sum vit høvdu í telefonini hóskvøldið.

– Jú, eg haldi so avgjørt, at hesin dysturin er nakað heilt serligt. Spenningurin er stórur her norðuri, og øll minnast til, hvussu tað var í fjør, tá bæði liðini komu heim við gullmerkjum, so sjálvandi eru vit spentar. Eisini tí at Flogbóltssambandið hevur gjørt eitt rimmar arbeiði í at marknaðarføra dystirnar. Alt verður sjónvarpað beinleiðis, og alt fokusið um dystin ger, at talan er um nakað heilt serligt.

## Stuttligt við avbjóðingum

At uppgávan í ár tykist verða heldur torførari enn í fjør, er Marjun fult greið um, men kortini tykist hon á ongan hátt at hava mist mótið um ein sigur.

– Tær hava jú fingið Marinu sum venjara, og hon er so avgjørt ein stór hóttan mitt fyri. Harumframt hava tær eisini betra um egna spæl sítt, so vit skulu heilt sikkurt spæla upp til okkara besta fyri at vinna.

– Eg haldi annars, at tað er stuttligt, at feløg fáa útlendskar leikarar í sín part. Tað gevur okkum eisini størri avbjóðingar, og sjálv haldi eg, at spælið verður stuttligari, størri avbjóðingarnar eru.

## Hugsa ikki um tapið

Fyri viku síðani taptu Mjølnir kvinnurnar heimadystin, sum kundi tryggja teimum gullmerkið í FM-kappingini, men Marjun heldur ikki, at tað eigur at oyðileggja nakað í degnum í dag.

– Tá fingu vit ein skaða dagin fyri dystin, og máttu tí broyta upp á liðið. Nú eru allar klárar, og fáa vit okkara spæl at koyra, samstundis sum vit brúka høvdið, so hava vit avgjørt ein góðan møguleika. Samstundis ræður um, at tær ikki sleppa í gongd við spælið á miðjuni.

Tað skal so eingin ivi vera um, at vit ætla okkum at vinna dystin, og tað ætla vit eisini at geva alt fyri at megna, sigur Marjun Kalsø at enda.

∆

# ÍF–Mjølnir

FINALUDYSTUR
*Jákup Mørk*

Sjálvsagt er spenningurin stórur hjá fuglfirðingunum, nú teir skulu í steypaeldin, sum verður kyndur á Hálsi í Havn. Hóast hetta, so er tó ikki líkt til, at týdningurin av dystinum nervar spælararnir hjá ÍF so øgiliga nógv. Í hvussu so er var tað ein róligur men tó greiður, Bartal Eliasen, sum vit tosaðu við undan finaluni.

– Vit fyrireika okkum sum vit vanliga gera til dystirnar. Kanska uppmøtingin hevur verið eitt sindur betri nú, men annars taka vit uppgávuna sum ein og hvønn annan dyst, sigur liðskiparin.



Um spurningin, hvørt tað kanska ikki er neyðugt at gera nakað eyka til at seta leikararnar upp, sigur Bartal, tað er tað nokk ikki.

– Eg havi tað í øllum førum soleiðis, at antin spælir mann, ella spælir mann ikki.

## Skiftandi tilvera

ÍF hevur annars havt eina skiftandi tilveru seinnu árini. FM heitið fyri tveimum árum síðani varð fylgt upp av eini botnplasering í fjør, men í dag eru fuglfirðingar aftur at finna í toppinum. Spurdur um teir kanska vóru ov nøgdir við FM heitið, men nú aftur eru um at gerast svangir, svarar Bartal, at tað heldur hann ikki.

– Teir ungu hava alla tíðina verið við, og í ár hava vit so fingið Odd Eliasen við aftur. Harumframt er Boban Ilic jú komin til sum venjari, og tað er jú altíð ein styrkur at fáa ein góðan leikara.

## Ikki favorittar

Um favorittleiklutin, sum fleiri hava givið teimum, nú teir júst hava vunnið á Mjølni, sigur Bartal, at í hansara hugaheimi eru teir ikki favorittar.

– Bløðini hava skrivað, at vit eru favorittar, men har eri eg ikki samdir. Tekur tú seinastu sjey dystirnar hjá okkum móti Mjølni, so hava vit bara vunnið tveir teirra, so hagtølini eru so avgjørt við teimum. Um nakað, so kann tað verða ein vansi, at vit júst hava vunnið á teimum, tí kann gerast ein koddi, uttan at vit tó ætla, at hetta skal henda.

Men hvat skalt so til, fyri at ÍF kunnu gerast steypavinnarar?

– Tað krevur fyrst og fremst, at vit allir geva okkum 110%. Mjølnir hevur kanska tað betra spælið á miðjuni, meðan vit eru sterkari á kantunum. Tí ræður um, at vit fáa okkara spæl at koyra, og vit fara so at gera tað, sum vit eru mentir, fyri at hetta skal eydnast, sigur Bartal Eliasen at enda.

FINALUDYSTUR
*Jákup Mørk*

Liðformaður hjá liðnum, sum í dag skal royna at verja steypaheitið frá í fjør er Bogi H. Isaksen.

Í fjør var hann við til at tryggja Klaksvíkini dupult gull í steypakappingini, og hann ásannar eisini, at spenningur undan dystinum í dag er øgiligur, og hann roknar við, at nógv fólk verður til dystirnar. Mjølnir hevur eisini skipað fyri ferðing til Havnar í bussi, men tá vit tosaðu við liðformannin hóskvøldið, helt hann ikki, at so nógv høvdu teknað seg.

– Eg ivist tó ikki í, at tað verða nógvir áskoðarar, og ivaleyst eru eisini fleiri, sum fara at melda til bussferðina beint undan dystunum, heldur Bogi.



## Eingin kreppa

Eftir úrslitunum fyri viku síðani at meta, so er Mjølnir í eini lítlari kreppu í løtuni, og sæst hetta millum annað aftur í, at teir nú hava mist oddasessin í landskappingini. Sjálvur heldur Bogi tó ikki, at talan á nakran hátt er um kreppu.

– Sjálvandi ávirkar tað at tapa tveir dystir á rað, men eg haldi ikki, at vit fáa nakrar nervar av teirri orsøk. Talan var stutt og greitt um eitt vánaligt vikuskifti fyri okkara viðkomandi, og leygardagin (móti Fleyr, blðm.)spældu vit eisini illa. Sunnudagin spældu vit tó væl móti ÍF, men taptu kortini, men vit mugu so bara koma víðari.

– Hetta er heldur ikki nakað, sum hevur ávirkað venjingina í vikuni upp undir dystin. Vit hava kanska vant okkurt yvirraskilsi, men tað fari eg so ikki at avdúka her, sigur liðskiparin.

Hóast hann sostatt ikki vil avdúka nakra spæliætlan, so er hann tó greiður um, hvat krevst, um Mjølnir aftur í ár skal kunna rópa seg steypavinnarar.

– Vit mugu nokk broyta eitt sindur upp á taktikkin hjá okkum í mun til seinast. Serliga skulu vit hava betri fatur á kantunum, men annars skulu vit ikki broyta so nógv. Tað ræður mest um at fáa okkara spæl at koyra, og tað er so púra vist, at vit ætla at gera okkara til, at talan verður um eina endurtøku av dupulta sigrinum frá í fjør, sigur Bogi H. Isaksen at enda.